# Kjak



**Heðin Mortensen**
*borgarstjóri*

# Okkara fíggjarætlan er væl skipað

*Ongin orsøk er hjá Annfinni Brekkstein, býðráðslimi, at stúra fyri fíggjarætlanini hjá Tórshavnar Kommunu fyri 2011. Íløguætlanin hevur langt sikti, og kommunan økir ikki um skuld sína næsta ár*

Tvær misskiljingar!

So stutt kann mann lýsa eitt lesarabræv, sum Annfinn Brekkstein, býráðslimur fyri Sambandsflokkin, hevur í fjølmiðlunum í dag, hósdagin 11. nov.

Spurningurin er, um býráðslimurin misskilir við vilja ella ikki. Tað skal eg lata liggja. Tó er neyðugt at greiða tey bæði høvuðspunktini, sum Annfinn Brekkstein í sínum teksti misskilir.

### Hóskandi lántøka

Fyrra misskiljingin gongur uppá, at Tórshavnar Kommuna skal hava "tyngjandi lántøkur". Tað rætta er, at Tórshavnar Kommuna hevur eina hóskandi lántøku, ið er lítil í mun til fíggjarligu orkuna hjá kommununi. Í veruleikanum er skuldin eina kvarta álíkning. Markið fyri lántøku uttan serligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum er, sum Annfinn Brekkstein veit, ein heil álíkning.

Higartil hevur kommunan tikið 173 mió. kr. í láni. Lánibyrðan er ikki økt meira enn tað liggur í kortunum fyri 2010, og soleiðis verður samlaða skuldin í mesta lagi uml. 225 mió. kr. við árslok í ár.

So er spurningurin: hvussu stór verður skuldin eitt ár seinni, tvs. við árslok 2011? Jú, hon verður neyvt tann sama, nevniliga í mesta lagi 225 mió. kr.

Í fíggjarætlanini fyri 2011 verða 11,3 mió. kr. goldnar í rentum. Avdráttir á 17,8 mió. kr. verða umfíggjaðir, men tað ávirkar ikki skuldina. Hon fer jú ikki upp um 225 mió. kr.

At siga, at kommunan hevur "tyngjandi lántøkur" er at skjóta langt við síðuna av. Skuldin økist ikki meira, enn lagt er upp til í Fíggjarætlanini fyri 2010.

### Støðug langtíðatíløguætlan

Seinna misskiljingin hjá Annfinni Brekkstein gongur uppá, at ongin langtíðar íløguætlan skal vera fyri Tórshavnar Kommunu. Tað rætta er, at tað fyriliggur ein langtíðar íløguætlan.

Í sambandi við arbeiðið við fíggjarætlanum liggur sjálvsagt ein íløguætlan sum grundarlag, og henda ætlan strekkir seg yvir fleiri ár. Til dømis fylgir útbyggingin av eldra- og skúlaøkinum eins og kloakætlanin einari langtíðar íløguætlan.

### Skattaprosent og -hækking

Afturat teimum báðum misskiljingunum hjá Annfinni Brekkstein omanfyri, hevur hann eitt sjónarmið um skattahækkingar. Her er eisini neyðugt við einari rættleiðing.

Eitt hitt fremsta málið hjá Tórshavnar Kommunu er at nøkta tørvin á ellis- og røktarheimsplássum í Suðurstreymoy, sum er eitt øki, landið hevur forsømt.

Býráðið hevur sett sær fyri at byggja røktarheim til 64 fólk yviri við Strond. Spakin verður settur í í hesum árinum. Henda íløga kemur aftur at øðrum íløgum hjá kommununi, sum longu eru í gond, serliga á skúlaøkinum. Tí hevur verið neyðugt at hækka skattin, við einum prosenti, so fígging er til hesa serstøku íløgu í eldraøkið – væl at merkja uttan at taka lán!

Kanska andstøðan í býráðnum hevði viljað verið røktarheimið fyri uttan, men tað vilja borgarar í Tórshavnar Kommunu neyvan, tí tørvurin er stórur. Tí hækkaði skatturin eitt prosent í ár, og stórt forstáilsi hevur verið fyri tí millum okkara borgarar.

Harumframt er greitt, at í 2006 yvirtóku kommunurnar rakstraruppgávur frá landinum. Hetta fór fram á ein skipaðan hátt, har ábyrgd og avgerðarrættur fylgdust. Hetta kunnu vit frøast um.

Talan er um barnaverndarøkið og stuðulsfólkaskipanina fyri børn, sum kostaðu á leið 24 mió. kr. ella uml. eitt skattaprosent, ið kommunuskatturin hækkaði við, og sum landsskatturin lækkaði við. Sostatt øktist skattatrýstið ikki av teirri orsøk.

Annfinn Brekkstein kann sova púra róliga hvørja nátt, tí okkara fíggjarætlan og arbeiðið við henni er væl skipað.

---

**Niels á Reynatúgvu**
*Vegna Samstarv*

# Samráðingar, sparingar og útlit

Uppleggið frá Fíggjarmálaráðnum hesaferð hevur verið, at eingin lønarhækkan skal verða innan fyri tað almenna. Tvs. at longu áðrenn partarnir settu seg við samráðingarborðið høvdu politikarar verið úti í miðlunum, og proklamera null lønarhækkan. Hettar er óseriøst av politikarum, og eitt beinleiðis álop á okkara samráðingarrætt. Vit selja okkara arbeiðskraft til arbeiðsgevaran, og treytirnar fyri hesi sølu verða ásettar við samráðingum, sum fara fram hvørja ferð sáttmálin gongur út.

Ein fíggjarlóg skal gerast og samtykkjast á hvørjum ári. Fakfeløgini eru til samráðingar næstan hvørt ár, og har verður aldrin rokna við at fáa ein verri sáttmála enn tann verandi. Tí er tað eyðsýnt, at Fíggjarmálaráðið skal leggja upp fyri lønarhækkan til tey alment settu á hvørjum ári.

At melda út undan samráðingunum, at eingir pengar eru til lønarhækkan er óseriøst, og vísur, at onkrir politikarar hava misskilt samanhangin millum sáttmálasamráðingar og fíggjarlógarsmíð. At hótta við uppsagnum grundaðar á krøv um lønarhækking er eisini óseriøst. Adressan er skeiv á hesum úttalilsi, tí tað eru ikki fakfeløgini sum seta ella koyra fólk. Okkara uppgáva er at samráðast um so góð kor fyri okkara limir, sum yvirhøvur gjørligt. Hesum veit Fíggjarmálaráðið av, og tí, enn einaferð, noyðast tey at leggja upp fyri lønarhækkingum hvørt ár. Hettar tí at keypiorkan minkar um lønin stendur í stað, og alt annað gerst dýrari.

Samgongan hevur arbeitt hart við at royna at bjarga landskassanum og hevur fingið løgtingið at taka undir við sær. Hallið er ov stórt, so sparingar og nýggj avgjøld skulu til fyri at venda gongdini. Hettar er í hvussu so er pástandurin hjá politikarunum. Hesi tiltøk raka okkum øll beinleiðis. Vóru Føroyar dýrar at liva í áðrenn, so verður hvana verri nú. Og tá politikarar so samstundis vænta nullvøkstur í almennu lønunum, so hava vit jú eitt reallønarfall. Tað góðtaka vit undir ongum umstøðum og fara vit at berjast ímóti av øllum alvi.

Í frágreiðingini til fíggjarlógina síggja vit, at aftaná kreppuna, sum rakti allan heimin í 2008, er nú vend við at koma í. Búskapurin hitnar spakuliga, og samfelagshjólini mala eitt sindur skjótari. Tað viðførur eisini øktar inntøkur. Bæði til einstaklingin og til okkara kæra landskassa.

Eftir rak ár koma feit ár og tað er hetta, ið hendir nú. Um ikki feit enn, so síggjast batar í hvørjum.

Búskaparfrøðingurin Hermann Oskarsson hevur í nýggjastu grein sínari víst á, at ætlanin hjá samgonguni er púra burturvið. Vit nýtast als ikki at óttast hettar hallið í landskassanum, tí tað hvørvur uttan iva av sær sjálvum aftur, tá tíðirnar batna aftur. Vit arbeiða okkum snøgt sagt úr aftur kreppuni. Og tað er júst tað, sum vit fara í gongd við nú.

Ístaðin fyri at leggja dempara á alt samfelagið við øktum avgjøldum og manglandi lønarvøkstri, so átti samgongan heldur at koyrt á, og roynt at fingið ferð aftur á búskapin. Arbeiðandi fjøldin skal frammanundan av við skatt, mvg og avgjøld av øllum handa slag, so landskassin fer ongan veg, og fyllist nokk aftur, uttan at hesi verða hækkað.

Vit í Almenna Fakfelagssamstarvinum vilja hevja okkara rætt til at samráðast við vissu um góð úrslit.

Vit krevja nakað og vit fáa nakað.